Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Mintust Ólav á Váli

**Fríggjadagin 26. august var móttøka í Snarskivuni í Havn, í samband við at Ólavur á Váli, sangari og listamaður, sum andaðist 19. februar í ár, hevði fylt 50 ár hendan dagin**

MÓTTØKA
*Myndir: Eyðvør á Váli*

Nógv fólk vóru til staðar fríggjadagin 26. august 2005 kl. 16, tá Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, læt upp eina listaframsýning í Snarskivuni á Vaglinum við 35 tekningum, sum Ólavur á Váli, listamaður og sangari, ið hevði fylt 50 ár hendan dag, hevði teknað.

19. februar í ár vóru brádliga boð eftir Ólavi á Váli, sum andaðist bert 49 ára gamal. Ólavur var ein gávuríkur maður, hann var listamaður og hevði eina songrødd, sum bert fáum unnist her á fold.



*Her sæst Anna á Váli (h.m.), mamma Ólav, og Dinna Poulsen (v.m.), fastir Ólav á Váli*

Umframt borgarstjóran segði Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, nøkur orð, og Dánjal Poulsen, greiddi frá um Evangelisku Røddina og nýggju fløguna sum varð útgivin sama dag.

Talan er um tvífløgu við 41 songum, har Ólavur á Váli syngur; nakrar sangir syngur hann saman við øðrum. 14 sangir hava ikki verið útgivnir á fløgu fyrr.

Framsýningin heldur fram næstu vikurnar í Snarskivuni.



*Gunnley Durhuus og Birgir Kruse*



*Helgi Fossádal, Edvard Fuglø og Astri Luihn*



*Kirstin Andreasen og bróðursonurin Jens Chr. Guttesen*



*Eli Smith, Jens Andreassen og Eyðun Andreassen. Eisini sæst Jukim Olsen*